Tilfeingis- og vinnumálaráðið
Postbox 377
110 Tórshavn

Hoyvík 3. februar 2026

Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

Bóndafelag Føroya tekur undir við uppskotinum um at leingja heimildina at skjóta grágás til 2030.

Felagið loyvir sær samstundis til at vísa á, at trupulleikar eisini eru við einum øðrum gásaslagi.

Brandgásin (Branta leucopsis) er innræsin fuglur, sum hesi seinastu árini er nørdur munandi. At byrja við sóust bert brandgæs heima á Sandi, men er nú brandgásin eisini vorðin vanlig norðanfjørðs, har stórir flokkar vanliga síggjast í bønum. Brandgásin er innræsin, og fyri landbúnaðin er hon skaðafuglur eins og grágásin. Bóndafelag Føroya vil tí heita á politiska myndugleikan um at broyta fuglaveiðulógina soleiðis, at eisini verður loyvt at skjóta brandgás undir somu treytum sum grágás.

Uppskot til broyting er, at skoytt verður uppí “og brandgás” har “grágás” er nevnd.

Dømi.:

(Aftan á § 17 verður sett

“17 a. Uttan mun til ásetingarnar í § 17, stk. 1 og 2, kann tann, sum eigur, festir ella leigar lendi, søkja um loyvi at skjóta grágás ***og brandgás*** á hesum lendi, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av henni. Landsstýrismaðurin kann áseta eitt ovara mark fyri talið á grágás ***og brandgás***, sum skjótast kann.)

Vinarliga

Sigert Patursson
Formaður, Bóndafelag Føroya